*Í felag fyri teg*

# PEDAGOGBLAÐIÐ

Nr. 2 | Juli 2021 | pedagogfelag.fo



## Foreldrasamstarvið er lykilin til góða barnalívið

## Ongin vilji at samráðast

## Talgild atkvøðugreiðsla riggar væl

## Annika nýggj í nevndini

FØROYA PEDAGOG FELAG

Útgevari
Føroya Pedagogfelag
Tel. 35 75 76
pedagog@pedagogfelag.fo
www.pedagogfelag.fo

Lagt til rættis
Ingolf S. Olsen - PRESS

Layout
Grafikmaster
www.grafikmaster.fo
info@grafikmaster.fo

Prent
Føroyaprent

Upplag
300 eintøk

## NEVND



Jógvan Philbrow
Formaður
jogvan@pedagogfelag.fo



Nikkil Heinesen
Næstformaður
nikkil@pedagogfelag.fo



Harald Joensen
Skrivari
harald@pedagogfelag.fo



Annika Østerø
Nevndarlimur
annika@pedagogfelag.fo



Gunnvá A. Hansen
Nevndarlimur
gunnva@pedagogfelag.fo

## UMSITING



**Jógvan Philbrow**
Formaður
jogvan@pedagogfelag.fo



**Birita Hammer Jacobsen**
Umsitingarleiðari
birita@pedagogfelag.fo



**Gudny Benjaminsdóttir**
Bókhaldari
gudny@pedagogfelag.fo



**Bára Sólheim Guttesen**
Málsviðgeri
bara@pedagogfelag.fo

## Skrivstovan í summarfrí

Skrivstovan hjá Føroya Pedagogfelag fer nú í summarfrí og er afturlatin frá 16. juli til 9. august. Opið verður sum vanligt frá 9. august.

Átrokandi boð kunnu sendast til teldupostin pedagog@pedagogfelag.fo



**4** Foreldrasamstarvið er lykilin til góða barnalívið

**10** Ongin vilji at samráðast

**14** Talgild atkvøðugreiðsla riggar væl

**16** Annika nýggj í nevndini

**17** Formansrøðan



ODDAGREIN **Jógvan Philbrow, formaður, skrivar**

# Vón fyri framtíðina



So standa vit her. Eftir drúgt stríð, bleiv sáttmálasemja undirskrivað. Lat tað vera sagt beinanvegin, at hetta var ikki úrslitið, sum vit høvdu ætlað – men tó eitt stig á leiðini rætta vegin.

Semingsstovnurin setti sær aftur hesaferð fyri at broyta skalagongdir, og tað fer at órógva starvsaldur, og hvussu starvsaldurin hjá vanliga námsfrøðinginum verður roknaður, í fleiri ár. Hinvegin kom endalønin hjá hesum somu næstan á tað stigið, sum vit miðaðu fram ímóti.

Vit vónaðu, at arbeiðsgevararnir vildu gera nakrar ábøtur, ið kundu lofta nakrar av teimum stóru avbjóðingunum, eitt nú starvsfólkatrotið. Tá hugsa vit ikki bara um trotið á námsfrøðingum, men eisini á hjálparfólkum. Her var viljin tó ikki til meira enn 2,05 prosent upp á lønina fyrra árið og 1,25 prosent seinna árið.

Stóra evnið hesa ferð var § 10 í sáttmálanum, "Tíð til annað arbeiðið" – tað, sum vit vanliga kalla fyrireikingartíð. Ásetingin sigur í dag, at øll eiga at fáa ta tíð, ið krevst, men onki verður nevnt um, hvussu nógv tað er.

Okkara fatan er, at ásetingin fyri tað mesta merkir, at fólk als onga tíð fáa til fyrireiking.

Talan er um eina áseting, sum eisini umfatar serøkið, tó at tørvurin og skipanin har er ein heilt onnur.

Tað er tó ein vón fyri framtíðina, tí ein bólkur av foreldrum hevur av álvara lagt tímatrotið til merkis og er farin at arbeiða miðvíst fram ímóti at fáa tryggjað eitt minstamark av tímum á dagstovnum.

Vit fingu hóast alt við í semjuna, at hetta økið – § 10 í sáttmálanum – skal lýsast av uttanveltaðan fólki, sum sáttmálapartarnir semjast um at útnevna. Ein slík lýsing er eisini tiltrongd, og hon fer væntandi eisini at staðfesta, at verandi áseting um tíð til annað arbeiði ikki verður fylgd, tí normering og tíð ikki verða sett av til endamálið.

Tað er einki at ivast í, at umstøðurnar hjá tykkum limum generelt eru alt ov strongdar og mugu bøtast. Her liggur nógv á láni, men samanumtikið mettu vit í nevndini tó, at vit ikki kundu røkka longur undir verandi umstøðum, og at seinasta semingsuppskotið tí var nøktandi.

Fari at enda at ynskja tykkum øllum og familjum tykkara eitt gott summar.

# FORELDRASAMSTARVIÐ ER LYKILIN TIL GÓÐA BARNALÍVIÐ

**At foreldur og stovnur samstarva væl hevur alstóran týdning fyri barnið. Ikki bara í barnaárunum, men alt lívið, siga námsfrøðingarnir, Tordis Dam Johannesen og Laila í Løðu**

ÓLUVA ZACHARIASEN

Samstarvið millum foreldrini og stovnin er eitt týðandi tilfeingi, sum starvsfólkini á dagstovnunum í størri mun eru farin at geva sær far um og seta orð á.

Á fundi í áhugabólkinum Dagstovnanámsfrøði í Føroyum tann 13. apríl varð kikarin millum annað settur á foreldrasamstarv, og hvussu dagstovnar kunnu arbeiða fyribyrgjandi. Hesaferð var tiltakið í Miðgarði í Miðvági, har starvsfólk og leiðsla fyrst høvdu framløgu, og síðani var kjak.

## Tilvitað fokus á samstarv

Millum teir umleið 40 námsfrøðingarnar á fundinum vóru Tordis Dam Johannesen og Laila í Løðu, sum hava starvast sum námsfrøðingar í ávikavist 20 og 11 ár.

Tær eru samdar um, at góða foreldrasamstarvið liggur í dagliga samskiftinum og samstarvinum við foreldrini. Og her er umráðandi, at stovnurin tilvitað setir fokus á foreldrasamstarvið við námsfrøðiligum amboðum og málsetningum.

Tær halda, at vit hava flutt okkum frá tíðini, har stovnarnir hildu seg næstan einsamallar eiga ábyrgdina av børnunum. Ja, eitt sindur sum "farið tit foreldur til arbeiðis, so skulu vit nokk orðna gerandisdagin hjá barninum".

– Í dag hugsa vit meira, hvat er tørvurin hjá barninum, og hvat skal til, fyri at tykkara barn skal trívast. Foreldrini eiga ábyrgdina, meðan vit stuðla upp undir, at barnið og familjan trívast, sigur Leila í Løðu, sum starvast í Miðgarði.

## Akkersfólk

Alt fleiri stovnar hava til dømis slept regluni um, at børnini skulu møta áðrenn klokkan hálvgum tíggju. Hetta er fyri at geva familjuni ein róligari gerandisdag og møguleika at vera meira saman.

Eisini leggja námsfrøðingarnir stóran dent á tíðina, tá barnið av fyrstan tíð byrjar á stovni.

Til dømis hevur Sóljugarður í Sandavági, har Tordis starvaðist til 1. mai í ár, eitt sokallað akkersfólk gjøgnum alla vøggustovutíðina.

- Vit eru meira og meira varug við týdningin av tilknýti. Tað er umráðandi, at barnið fær tilknýti til okkum, sum eru um tað. Men ikki fýra nýggj fólk í senn. Tí fær barnið eitt starvsfólk – eitt akkersfólk – sum serliga tekur sær av tí, greiðir Tordis frá.

Royndirnar eru eisini, at tá ein tíð er farin, og barnið er trygt í vøggustovuni, so fer tað sum oftast til sítt akkersfólk, um okkurt er á vási. Hetta vísir, at skipanin við akkersfólki hevur týdning fyri at skapa tryggleika og tilknýti.

Innkoyringin í vøggustovuna er rættiliga skemaløgd. Fyrstu dagarnar er barnið stutta tíð á stovni, og foreldrini eru við. Tá umleið tvær vikur eru farnar, kann barnið vanliga vera fullan dag á stovninum. Men í summum førum skal barnið brúka longri tíð til at venja seg við stovnsgerandisdagin.

## Fyrsta samrøðan

Samstarvið við foreldrini fer í gongd, áðrenn barnið byrjar á stovni.



*– Fyrr vóru tað ofta vit, sum tosaðu og greiddu frá um stovnin. Men í dag leggja vit størri dent á, at foreldrini skulu hava orðið, sigur Laila í Løðu, námsfrøðingur í Miðgarði í Miðvági*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*



*Dagstovnurin Sóljugarður í Sandavági*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

Laila greiðir frá, at í Miðgarði hava tey eina innkoyringarsamrøðu, áðrenn barnið byrjar í vøggustovu. Bæði foreldrini skulu møta – uttan barnið. Hetta er fyri at geva foreldrunum frið at savna seg um samrøðuna uttan at verða órógvað.

– Fyrr vóru tað ofta vit, sum tosaðu og greiddu frá um stovnin. Men í dag leggja vit størri dent á, at foreldrini skulu hava orðið, sigur Laila.

Áðrenn innkoyringarsamrøðuna fáa foreldrini eitt vælkomuskriv við kunning um, hvat innkoyringarsamrøðan fer at snúgva seg um. Millum annað um viðgongutíð, fyrstu tíðina hjá barninum, hvat tey vænta av vøggustovuni, og hvussu tað fer at ávirka barnið at byrja í vøggustovu.

## Kokuloysn og strongd

– Vit byggja okkara arbeiði nógv á gransking og evidens, og vit vita, at kenslur og nervaskipan verða til longu í móðurlívi. Tí ávirkar tað barnið, hvussu mamman hevur havt tað í viðgongutíðini, greiðir Laila frá.

Hevur mamman til dømis havt kokuloysn og hevur noyðst at ligið nógv, kann hetta ávirka motorikkin hjá barninum. Eisini strongd og burðartunglyndi hjá mammuni hava týdning fyri menningina hjá barninum. Alt hetta er umráðandi fyri stovnin at vita, soleiðis at starvsfólkini kunnu stuðla barninum og familjuni best møguligt.

Tey hava gjørt eitt spurnarskjal fyri at leiða samrøðuna betri og fyri at tryggja, at tey fáa alt við. Haraftrat tryggjar spurnarskjalið, at øll starvsfólkini veita somu tænastu.

Tey hava eftirmetingarsamrøðu eftir átta vikur og so vanliga eina árliga foreldrasamrøðu. Og har er prinsippið, at onki nýtt verður tikið upp til árligu foreldrasamrøðuna, tí at



foreldur og starvsfólk skulu kunna tosa um alt viðvíkjandi barninum í dagliga samskiftinum.

## Góðanmorgun og vælkomin

Laila og Tordis leggja dent á, at tað er umráðandi, at starvsfólkini altíð eru har, tá foreldrini koma við barninum.

– Foreldrini skulu ikki leita eftir okkum. Eitt starvsfólk skal altíð taka ímóti og nevna navnið á barninum. Tey skulu merkja, at tað hevur týdning, at tey koma her í dag, sigur Laila.

Dagliga samskiftið millum foreldur og starvsfólk hevur stóran týdning. Tað kann vera, tá barnið møtir um morgunin, tá tað fer heim og annars eftir tørvi. Dagliga samskiftið og samstarvið geva bestu fortreytirnar fyri at loysa møguligar trupulleikar, áðrenn teir vaksa seg størri. Við góða dialoginum skulu foreldrini kenna seg trygg. Og tryggari foreldrini eru, tryggari gerast børnini.

## Ov nógvar tímar á stovni

Ein partur av dialoginum kann eisini vera, at námsfrøðingarnir siga foreldrunum frá, um barnið hevur tørv á at vera meira heima og at hava styttri dagar á stovninum.

Hetta kann vera trupult at siga, tí vit vita væl, at nógv foreldur eru sera upptikin av arbeiði. Men tað er umráðandi at taka støði í tørvinum hjá barninum, og ofta ber til at laga tað soleiðis, at annað av foreldrunum, ein gubbi ella omma kunnu koma eitt sindur fyrr eftir barninum, greiða Tordis og Laila frá.

Sjálvandi vita starvsfólkini, at summi foreldur kunnu vera hart spent fíggjarliga og hava lítið netverk. Tá royna vit at loysa støðuna við at geva barninum eyka umsorgan, tí foreldrini hava so lítlar møguleikar at stytta dagin hjá barninum á stovninum, siga tær.

## Námsfrøðilig amboð

Tað er umráðandi at grunda arbeiðið á stovnunum á námsfrøðiliga vitan og amboð. Laila greiðir frá, at tey millum annað brúka Tiltøk í Tøkum Tíma (TÍTT), sum SSP hevur ment, og sum er eitt amboð at meta um trivnaðin hjá børnum.

Støðan hjá einstaka barninum verður mett tvær ferðir um árið við einum trivnaðarskjali, har tey brúka litirnar grønt, gult og reytt at lýsa støðuna: Grønt, tá barnið trívist, gult, um onkur viðurskifti undra starvsfólkini, og reytt, um starvsfólkini eru stúrin um støðuna hjá barninum.



*– Eg ynski mær eitt átak longri uppi í skipanini, har orð verða sett á, hvat er tað góða barnalívið. Vit hava skipað samfelagið soleiðis, at vit stappa børn inn á stovnar, uttan at hugsa um neyðugu normeringarnar, sigur Tordis Dam Johannesen.*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

Endamálið er at tryggja, at hond verður tikin um møguligar trupulleikar so tíðliga sum gjørligt. Ávaringartekn kunnu millum annað vera, at barnið hevur ov lítla eygnakontakt, onki mál, ov lítla sosiala orku (móð børn) ella ikki søkir vaksin nóg nógv.

Eru avbjóðingar, tosa námsfrøðingarnir við foreldrini um hetta, soleiðis at stovnur og foreldur kunnu samstarva um eina loysn.

Eisini eru tey partur av PNN, sum er professjonelt námsfrøðiligt netverk, har dagstovnar samstarva um at finna amboð at handfara aktuellar avbjóðingar í dagstovnaarbeiðinum. Millum annað avbjóðingina at skipa professionelt foreldrasamstarv í einum nærumhvørvi, har øll kenna hvønn annan.

Tey gera nógv burturúr at eftirútbúgva fólk og støðugt søkja sær nýggjastu vitan og gransking innan námsfrøði.

## Stovnurin er eitt ískoyti

Tordis og Laila eru samdar um, at stovnurin kann ongantíð koma ístaðin fyri foreldrini, men kann bara vera eitt ískoyti.

Sambandið millum barn og foreldur er sera umráðandi, tí gott tilknýti virkar fyribyrgjandi. Og júst hetta er ein avbjóðing í dagsins samfelag, har foreldur skulu náa so nógv – langar arbeiðsdagar, ítróttartiltøk, bindiklubbar og so framvegis.

Námsfrøðingarnir síggja tað sum sína fakligu uppgávu at vegleiða foreldrini og siga frá, um barnið trongir til eyka umsorgan og uppmerksemi.

## Ov fá vaksin

Hóast dagstovnarnir arbeiða tilvitað við at stimbra barnið og lofta møguligum avbjóðingum, so ásanna Tordis og Laila, at orkan og møguleikarnir hava eitt mark.

Normeringarnar eru ov smáar, ov fáir útbúnir námsfrøðingar eru, og at kalla ongin tíð er til at fyrireika námsfrøðiliga arbeiðið.

– Sambært sáttmála hava vit ein tíma um vikuna til at fyrireika og eftirmeta pedagogiska arbeiðið, og tað er ov lítið. Tað skuldi verið í minsta lagi fimm tímar um vikuna, sigur Tordis.

Laila viðgongur, at nógv fyrireiking hjá námsfrøðingunum verður gjørd í frítíðini og døgurðatímunum.

Tordis sigur, at hon er givin at fyrireika í frítíðini. Tað gjørdi hon, tá hon var yngri og nýggjari í fakinum, men hon vil ikki longur arbeiða ókeypis.

– Eg ynski mær eitt átak longri uppi í skipanini, har orð verða sett á, hvat er tað góða barnalívið. Vit hava skipað samfelagið soleiðis, at vit stappa børn inn á stovnar, uttan at hugsa um neyðugu normeringarnar. Í vøggustovu eru trý vaksin til 12 børn, men talið á starvsfólkum átti í veruleikanum at verið fýra. Og børn í aldrinum 10 til 18 mánaðir hava mestsum brúk fyri einum fólki í part, vísir Tordis á.

## Álvarsamt í longdini

Ónøktandi normeringar er nógv meira álvarsamt, enn vit geva okkum far um.

– Børnini brúka eyguni og andlitsbráið á teimum vaksnu til at regulera sína atferð. Hetta gevur teimum tryggleika. Og børnini søkja tey vaksnu, tá tey hava tørv á onkrum. Men um tað eru ov fá vaksin, so gevst barnið at enda at siga frá. Tað útsetir sín tørv, og tað er álvarsamt í longdini, sigur Tordis.

Fyrr í tíðini kundi barnið fara til ommuna og abban, tá foreldrini ikki vóru har, men í dag er tað á stovni meginpartin av degnum. At ov fá vaksin eru at møta tørvinum hjá barninum kann gjøgnum árini elva til eitt nú angist, strongd og tunglyndi. Tí mugu samfelagið og politikararnir taka normeringarnar á stovnunum í allarstørsta álvara, vísa Tordis og Laila á.

## Útgreina námsfrøðina

Áhugabólkurin, Dagstovnanámsfrøði í Føroyum, er í ferð við at útgreina, hvat eyðkennir námsfrøðina á dagstovnum her á landi. Endamálið er at gera námsfrøðina sjónliga – bæði fyri námsfrøðingum sjálvum og í samfelagnum. Bólkurin skal birta upp undir samrøður og kjak um dagstovnanámsfrøði umframt at kveikja áhuga og menna vitanina um hetta evnið.

Fundurin í Miðvági í apríl var triði fundurin í røðini hjá áhugabólkinum. Áður hava fundir verið í Kvívík og Kollafirði.

Allir limir í Føroya Pedagogfelag, eisini hvílandi limir, kunnu gerast partur av áhugabólkinum. Tilmelding kann gerast við at senda teldupost til dagstovnanamsfrodi@gmail.com



*–Viljin hjá arbeiðsgevarunum at diskutera nakað annað enn løn og lønarstig var ikki til staðar. Tað var eyðsýnt, at teir frá fyrsta degi komu til samráðingarborðið við tí fyri eyga, at Semingsstovnurin fyrr ella seinni skuldi upp í, sigur Jógvan Philbrow, formaður í Føroya Pedagogfelag*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

# Ongin vilji at samráðast

**Tað var alla tíðina týðiligt, at arbeiðsgevararnir ongantíð við egnari megi ætlaðu at røkka semju við Pedagogfelagið. Málið var at fáa semingsfólkini upp í. Tað sigur Jógvan Philbrow, formaður í Føroya Pedagogfelag, sum er vónbrotin av, at námsfrøðiliga økið hevur so lága raðfesting hjá bæði landi og kommunum. Hann er tó hampuliga væl nøgdur við lønarpartin í samtykta semingsuppskotinum, men ásannar, at tað er púra uttan visjónir**

INGOLF S. OLSEN – PRESS

Sjálvt um starvsfólkatrot er á øllum námsfrøðiligum arbeiðsøkjum í Føroyum, bæði hjá landi og kommunum, so tykist tað ikki órógva arbeiðsgevararnar stórvegis.

Tað er niðurstøðan hjá Jógvani Philbrow, formanni í Føroya Pedagogfelag, eftir sáttmálaorrustuna, sum endaði við verkfalli fyrr í summar.

– Arbeiðsgevararnir eru ikki áhugaðir í at menna námsfrøðiliga fak-

økið, so tað fram eftir kann gerast meira lokkandi hjá ungum fólki at útbúgva seg til, og so tað kann vera ein møguleiki fyri yvirhøvur at fáa nóg mikið av fólki til verandi størv. Vit eru so ógvuliga langt frá tí, men kortini tvíhalda arbeiðsgevararnir um eina klassiska samráðingartilgongd, sum ongi onnur mál og mát hevur enn løn og lønarkarm. Visjónir og arbeiðsinnihald eru at síggja til púra fremmand hugtøk hjá arbeiðsgevarunum.

– Hetta høvdu vit harafturímóti við í okkara krøvum undan samráðingunum. Vit fóru til samráðingar undir herrópinum "menniskjaligt haldføri", men viljin hjá arbeiðsgevarunum at diskutera nakað annað enn løn og lønarstig var ikki til staðar. Tað var eyðsýnt, at teir frá fyrsta degi komu til samráðingarborðið við tí fyri eyga, at Semingsstovnurin fyrr ella seinni skuldi upp í, sigur hann.

## Eitt stig á leiðini

Eftir slitnaðar samráðingar, miseydnaða semingsroynd og verkfall, eydnaðist semingsfólkunum loksins at fáa partarnar at taka undir við seinasta semingsuppskotinum 19. juni.

Semingsuppskotið fer eitt sindur út um karmin á almenna arbeiðsmarknaðinum annars, og saman við nøkrum flytingum ímillum lønarstig, tryggjar tað, at allir limirnir í Føroya Pedagogfelag fáa eina veruliga lønarhækkan.

– Tað gjørdi, at vit tóku undir við semingsuppskotinum. Lønarliga er tað eitt stig á rættari leið, men eg eri sjálvsagt vónbrotin av, at alt hitt, sum hevur við menniskjaligt haldføri at gera, ikki eydnaðist. Vit í Pedagogfelagnum hava brúkt nógva orku upp á tann partin, og ætlaðu veruliga at vinna fram á leið á tí økinum í hesum sáttmálasamráðingunum. Men tað skulu tveir partar til at vilja slík framstig, og arbeiðsgevararnir høvdu tíverri ongan áhuga, sigur Jógvan Philbrow.

## Menniskjaligt haldføri

Føroya Pedagogfelag leggur nógv í hugtakið menniskjaligt haldføri. Liviligar arbeiðsumstøður hjá námsfrøðingum og námsfrøðiligum hjálparfólkum er sjálvandi ein týðandi partur, tá hugsað verður um menniskjaligt haldføri, men tað snýr seg eisini um, at tær umstøður, sum námsfrøðin virkar í, broytast, eins og alt samfelagið ger tað. Tí má fakið eisini mennast og broytast, og umstøður og tíð mugu vera til tað, vísir Jógvan Philbrow á.

– Heimurin í dag sær ikki út, sum í 2000, tá vit fingu dagstovnalógina. Krøvini hjá myndugleikunum eru nøkur onnur í dag, millum annað skulu námsætlarnir leggjast og fylgjast, og ofta hava kommunurnar hvør sær síni stevnumið, sum eisini skulu fylgjast – eitt nú við málmenning, rørslu og spæli. Foreldur vita eisini meira um námsfrøði í dag og ynskja eisini meira.

– Fakið sjálvt hevur eisini ment seg nógv. Tað verður granskað nógv, og námsfrøðingar ynskja uppaftur meira gransking. Alt hetta, tann fakliga menningin og øktu krøvini frá myndugleikum og foreldrum, skal so implementerast í tann námsfrøðiliga gerandisdagin, um tað skal geva nakrar meining. Men tá vit vilja hava tíð til tað, renna vit høvdið ímóti einum múri. Arbeiðsgevararnir vilja ikki hoyra taling um slíkt.



Og sjálvt um vit longu á pappírinum fyri nøkrum árum síðani fingu eitt sindur av fyrireikingrtíð við í sáttmálan, so verða hvørki tíð ella pengar sett av til at halda ta ásetingina, sigur hann.

## Fyrireikingartíð

At fáa fyrireikinngartíðina kjølfesta og víðkaða var eisini eitt av høvuðsmálunum hjá Føroya Pedagogfelag undan sáttmálasamráðingunum hesa ferð.

– Ein námsfrøðingur, sum í dag arbeiðir fulla tíð á dagstovni, eigur á pappírinum ein tíma til fyrireiking um vikuna. Men stovnarnir fáa ikki játtan til at halda hesa ásetingina. Onkur stovnur roynir tó at halda ásetingina, men tað merkir, at pengar og tíð so mangla í onkra aðrastaðni á stovninum. Málið hjá okkum hesa ferð var at fáa fyrireikingartíðina upp á 12,5 prosent og vissu fyri, at játtan og normeringar fylgdu við. Men vit fingu onki, null, staðfestir Jógvan Philbrow.



## Serøkið er umskipað

Hann vísir á, at tað eisini er hent sera nógv á serøkinum seinastu 20 árini – frá stovnum undir táverandi Serforsorgini, har frástøðan ímillum starvsfólk og leiðslu var stutt, til Almannaverkið við eindarleiðslum.

– Alt serøkið er umskipað, og vit síggja millum annað, at Almannaverkið hevur so stórar avbjóðingar og so stórt starvsfólkatrot, at tey eru farin at lýsa breitt eftir umsorganarstarvsfólkum til størv, sum fyrr vóru námsfrøðingastørv, sigur Jógvan Philbrow.

## Vón um framtíðina

Hóast lítið fekst burtur úr at bøta

*– Politiski myndugleikin má skilja, at námsfrøðiliga økið má hava eina heilt aðra og hægri raðfesting, enn tað hevur nú. Annars fært tú ikki fólk at arbeiða har, og tá nyttar lítið at tosa um at fáa útbúgvið fleiri námsfrøðingar, sum tað annars í ólukkumát er tørvur á, sigur Jógvan Philbrow, formaður í Føroya Pedagogfelag*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*



Nevnd og umsiting vóru at kalla allatíðina savnað í húsunum hjá Føroya Pedagogfelag, meðan verkfallið var í juni. Úr vinstru eru tað Birita H. Jacobsen, umsitingarleiðari, Harald Joensen, skrivari, Jógvan Philbrow, formaður, Annika Østerø, nevndarlimur, Gunnvá Akraberg Hansen, nevndarlimur, og Nikkil Heinesen, næstformaður

Mynd: Ingolf S. Olsen

tað menniskjaliga haldførið í nýggju sáttmálasemjuni, so hevur formaðurin í Føroya Pedagogfelag ikki mist vónirnar um, at tað fer at bragda fram eftir.

– Tað má tað, og tað vænti eg eisini, at politisku myndugleikarnir, tað eru kommunurnar og landið, ið varða av ávikavist dagstovnaøkinum og almannaverkinum, skjótt fara at ásanna. Um ikki annað upp á tann harða mátan. Tí skipanirnar eru um at skrambla saman, og í ávísum førum eru tær longu skramblaðar saman. Ásetingarnar í dagstovnalógini um býtið ímillum námsfrøðingar og hjálparfólk verða verri enn so hildnar, og tað er meira enn so komið fyri, at dagstovnar hava mugað latið aftur í tíðarskeið, tí teir ikki lúka minimunskrøvini um manning.

– Tí má okkurt munagott gerast nú. Politiski myndugleikin má skilja, at námsfrøðiliga økið má hava eina heilt aðra og hægri raðfesting, enn tað hevur nú. Annars fært tú ikki fólk at arbeiða har, og tá nyttar lítið at tosa um at fáa útbúgvið fleiri námsfrøðingar, sum tað annars í ólukkumát er tørvur á, sigur Jógvan Philbrow.

## Trípartasamráðingar

Formaðurin í Pedagogfelagnum leggur dent á, at tey stóru tøkini at gera tær broytingarnar, sum eru alneyðugar at lyfta alt námsfrøðiøkið – íroknað løn og arbeiðsumstøður hjá námsfrøðingum – mugu gerast í friðartíð.

– Fyrsta stig er at ásanna, at vit standa við einum truplleika, sum ikki bara kann bólkast sum ein vanligur arbeiðsmarknaðarspurningur um løn. Síðani mugu vit saman við arbeiðsgevarunum seta okkum saman og brúka neyðugu tíðina at skipa alt økið við haldbarum loysnum, sum halda í nógv ár. Tað allarbesta hevði verið, at gjørt hetta við trípartasamráðingum, so at politiski myndugleikin eisini er við, og allir partar aftaná kunnu kenna ognarskap og ábyrgd, sigur Jógvan Philbrow.

# TALGILD ATKVØÐU-GREIÐSLA RIGGAR VÆL

**Korona hevur ikki ávirkað virksemið hjá Føroya Pedagog-felag so nógv, sum farsóttin kanska hevur gjørt hjá øðrum feløgum, tí felagið hevði frammanundan gjørt av at fara yvir til talgildar atkvøðugreiðslur**



*Aðalfundurin í ár var avmarkaður til álitisfólkini (myndin), og tann í fjør var avlýstur. Tí ber ikki enn til at siga, um talgilda atkvøðugreiðslan ávirkar uppmøtingina til aðalfundin*

Mynd: Ingolf S. Olsen

INGOLF S. OLSEN - PRESS

Fleiri fakfeløg og aðrir felagsskapir hava síðani tíðliga í fjør vár ikki kunnað hildið sínar egnu viðtøku-ásetingar um aðalfundir og val, tí alt mátti avlýsast vegna koronu.

Men hjá Føroya Pedagogfelag hevur ongin neyð verið í so máta, tí longu væl áðrenn koronafarsóttin fór at gera um seg, hevði felagið gjørt av at flyta seg samsvarandi tøkniligu menningini og gera tað møguligt hjá limunum at atkvøða talgilt.

## Alt talgilt

Fyrst var roynt við at hava talgildar brævatkvøður, men til aðalfundin í fjør var gjørt av, at allar atkvøður skuldu vera talgildar – eisini tey, sum møttu á aðafundi, skuldu atkvøða talgilt.

Avgerðin kom í tøkum tíma, má sigast, tú korona gjørdi tað neyðugt at avlýsa sjálvan aðalfundin fjør. Men við talgildari atkvøðugreiðslu bar kortini til at manna nýggja nevnd.

Og hóast aðalfundurin í ár varð hildin sum ætlað 6. mars, so vóru allar atkvøðugreiðslurnar í sambandi við aðalfundin talgildar. Tað er Herluf Sørensen, sum umsitur valskipanina. Onkur smávegis tøknilig avbjóðing var á vegnum við onkrari skráseting, men samanumtikið riggaði alt sera væl.

## Góð skipan

Eisini formaðurin er væl nøgdur við atkvøðuskipanina.

– Sjálvandi skal aðalfundurin verða eitt savningarstað hjá limunum, har tað skal bera til at taka orðið og kjakast. Tí skulu talgildu loysnirnar ikki koma í staðin fyri aðalfundin, men heldur hinvegin geva meira rúm fyri fakligum kjaki á sjálvum aðalfundinum. Nú fara onkrar talgildar atkvøðugreiðslur fram á sjálvum aðalfundinum, og nevndarvalúrslitið verður kunngjørt tá. Men í prinsippinum kunnu allar atkvøðugreiðslur vera avgreiddar undan fundinum, so hann effektivt kann brúkast til kjak og til at stinga út í kortið, hvør kósin fram eftir skal vera, sigur Jógvan Philbrow, formaður í Føroya Pedagogfelag.

## Aðalfundurin

Sjálvur aðalfundurin í ár var vegna koronu avmarkaður til álitisfólkini, og í fjør var hann sum nevnt avlýstur. Tí ber ikki enn til at siga, hvørt talgilda atkvøðugreiðslan ávirkar uppmøtingina til aðalfundin.

– Tað vóni eg ikki, at hon ger, men tað er greitt, at eitt so stórt felag við so stórum limaskara kring alt landið, hevur trupult við at savna øll til aðalfund. Tí er tað kærkomið, at tað nú ber til at atkvøða, sjálvt um ein er forðaður at møta upp á sjálvum fundinum. Tað er tað, sum er meiningin við talgildu loysnini, hon styrkir demokratiið í felagnum, tí øll sleppa at atkvøða, sama hvar tey eru stødd, sigur Jógvan Philbrow.



*Onkur smávegis trupulleiki var við onkrari skráseting, sum Herluf Sørensen, ið varaði av atkvøðuskipanini, og Mimi Steintórsdóttir, advokatur og orðstýrari, her royna at loysa*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

# Annika nýggj í nevndini



*Annika Østerø (myndin) fekk ikki færri enn 309 atkvøður á nevndarvalinum. Næstur henni var Nikkil Heinesen við 190 atkvøðum, sum tískil varð afturvaldur, og Gunnvá Akraberg Hansen, sum fekk 180 atkvøður, og bleiv fyrstvaldi tiltakslimur. Hon heldur eisini fram í nevndini sum avloysari fyri Valborg Heradóttir Hammer, sum er farin í farloyvi.*

Mynd: Ingolf S. Olsen

Á aðalfundinum hjá Føroya Pedagogfelag 6. mars, bleiv Annika Østerø tann stóri atkvøðuslúkurin og kom sum nývald í nevndina. Nikkil Heinesen bleiv afturvaldur. Gunnvá Akraberg Hansen var eisini upp á val, men gjørdist akkurát ov stutt. Hon heldur tó kortini fram í nevndini, tí sum fyrst valdi tiltakslimur er hon komin inn fyri Valborg Heradóttir Hammer, sum er í farloyvi.

Jógvan Philbrow varð uttan atkvøðugreiðslu afturvaldur sum formaður, tí ongin bjóðaði honum av.

Øll nevndin, sum skipaði seg nakrar dagar eftir aðalfundin, sær nú soleiðis út: Jógvan Philbrow, formaður, Nikkil Heinesen, næstformaður, Harald Joensen, skrivari, Annika Østerø og Gunnvá Akraberg Hansen.

Aðalfundurin gav eisini nevndini størri heimildir, tá tað um ognir felagsins ræður. Reglugerðin fyri Húsagrunnin varð broytt, so grunnurin nú kann eiga meira enn eina ogn.

Eisini samtykti aðalfundurin at lækka limagjaldið, sum frammanundan var 1,8 prosent av lønini. Nú er tað 1,6 prosent av lønini, men tó í mesta lagi 500 krónur um mánaðin.



*Jógvan Philbrow bleiv afturvaldur uttan atkvøðugreiðslu, tí ongin bjóðaði honum av*

Mynd: Ingolf S. Olsen

## Formansrøðan:

# Nýhugsan skal til

**Almenna frágreiðingin frá nevndini hjá Føroya Pedagogfelag stóð í seinasta blað, aðalfundarblaðnum, og tað var hana, sum aðalfundurin góðkendi. Nevndarfrágreiðingin var eisini reyði tráðurin í formansfrágreiðingini hjá Jógvani Philbrow, men sum siðvenja er, setti hann síni persónligu fingramerki á. Vit prenta her eina eitt sindur redigeraða útgávu av røðuni**

Vit hava nakrar avbjóðingar í felagnum. Tá vit fyri nøkrum árum síðani fóru undir, at endurskoða bygnaðin, vóru nakrar serligar yvirskriftir, ið gingu aftur:

- Sjónliggerð av felagnum fyri limirnar, tað veri seg leiðarar, námsfrøðingar og hjálparfólk.
- Sjónliggerð av fakinum fyri almenningin.
- Limarøkt.
- Arbeiðsumhvørvi.

Bygnaðurin er lagaður til hesar avbjóðingar. Vit hava í dag trý ráð og møguleika at stovnseta fakligar áhugabólkar.

Hetta skuldi styrkt um hesi viðurskifti, tí nú er møguleiki fyri at hava serligt fokus ella "nørdast" í tí, ein sjálvur hevur hug at nørdast í.

Ráðini fóru at virka í seinnu helvt av 2019, og síðan kom 2020 – tað er helst ikki neyðugt at siga meira, men eg trúgvi ikki, at vit enn hava sæð fulla úrtøku ella merkt ágóðarnar av at hava hesi ráð.

Vit hava sæð ein fakligan áhugabólk, ið hevur meldað seg á banan. Tað er Áhugabólkurin fyri dagstovnanámsfrøði í Føroyum, og hevði tað verði ynskiligt, at fleiri slíkir bólkar gjørdu seg galdandi við tí fyri eyga at fáa sett sjóneykuna á ymisku tættirnir í námsfrøðiliga yrkinum.

Vit, ið hava mynda felagið, hava eisini økt um sjónligu pallarnar hjá felagnum, seinast við at endurstovnað Pedagogblaðið, sum skal vera við til at varpa ljós á námsfrøðiligu tilboðini og virksemið í Føroyum. Vit hava eisini roynt at styrkt um samskiftið við limirnar ígjøgnum sosialu pallarnar, har serliga Nikkil hevur røkt okkara Facebook-síðu.

Hetta hevur verði við til at sjónliggera felagið í almenna rúminum – vónandi hava tit limir eisini lagt tað til merkis.

Men vit hava ikki bara samskift gjøgnum Facebook og Pedagogblaðið. Vit hava eisini við regluligum skrivum til álitisfólkini roynt at

kunnu um tey viðurskifti, ið røra seg í felagnum.

Eitt nú tá vit eru farin í samráðingar. Og ja, at samráðingarnar ikki eru lidnar í tí løtu, at sáttmálin gongur út, er ein óskikkur.

## Limarøkt

Tá talan er um limarøkt, hava vit eisini roynt at lagt størri dent á hendan partin. Eitt er tað "vanliga" fakfelagsarbeiðið, har roynt verður at stuðla og vinna einstaka liminum ella limabólkum tey røttu korini. Tað veri seg á bústovnum, verkstøðum, sambýlum, ungdómshúsum, frítíðarvirksemi, frítíðarskúlum, forskúlum, fólkaskúlanum, barnagørðum, vøggustovum ella serlig ráðgevarastørv og onnur størv.

Hitt er menningina av einum limaportali, ið gevur nakrar møguleikar, eitt nú eru avtalur gjørdar við fyritøkur um serlig limatilboð.

Umframt hetta hava vit eisini lagt okkum eftir, at limirnir fáa eina lítla jólagávu. Tó at tað ikki kann vera ein stór gáva, er hetta eitt tekin um, at vit eru í felag.

Næsta stig á hesi leið er eisini á skránni í dag, har vit ynskja at broyta reglugerðina fyri húsagrunnin hjá okkum, soleiðis at hann ikki verður avmarkaður til eina ogn, men eisini kann – um rætta ognin gerst tøk – brúkast til frítíðarhús ella felagshús við fleiri møguleikum.

## Øðrvísi loysnir

Vit hava eina avtalu við arbeiðsgevaran um, at vit skulu hava evnisdagar um arbeiðsumhvørvi, har vit í felag fáa viðgjørt støðuna og møguligar loysnir á annan hátt, enn vit plaga. Vit eru samd við arbeiðsgevaran um, at "um vit gera sum vit plaga, fáa vit tað sama sum vit plaga".

Vit eru eisini samd um, at tað er neyðugt at arbeiða meira ítøkiligt við at gera skilagóðar, dagførdar og nútímansgjørdar arbeiðstíðarreglur – ikki bert á serøkinum, men á hinum økjunum eisini.

Tað eru fleiri ábendingar um, at arbeiðsumhvørvi ikki er nóg gott, og hesum eru arbeiðsgevararnir eisini byrjaðir at fáa eyguni upp fyri.

## Framtíð við avbjóðingum

Framtíðin kemur, um vit vilja tað ella ikki. Framtíðin hevur nakrar avbjóðingar – avbjóðingar, sum eisini koma frá politisku skipanini.

At samgongan nú arbeiðir við, at peningurin skal fylgja barninum, kann ávirka ein stóran part av okkara arbeiðsumhvørvi.

Onkur av tykkum velur kanska at vera heima longri, og onkur størv verða kanska niðurløgd.

Ætlaða broytingin kann hugsast at hava ávirkan á, hvussu bólkar í samfelagnum skipa seg uttan um vanliga dagstovnatilboðið. Broytingin kann eisini merkja, at kvinnur vera burtur frá arbeiðsmarknaðinum í longri tíðarskeið enn í dag.

Fyri okkara limir merkir tað, at enn størri trýst liggur á okkum at fáa eftirlønarviðurskiftini á eitt sømiligt stig Eftirlønin hjá okkara limum er í dag ov lág – og um fólk ikki eru á arbeiðsmarknaðinum í longri tíðarskeið, hjálpir tað ikki upp á teirra eftirlønarumstøður.

## Verkfalsrættur

Ein onnur avbjóðing er ynskini hjá politikarunum at avmarka verk-

falsrættin. Rætturin at niðurleggja arbeiðið, tá eingin semja er millum partarnar, er ein grundleggjandi rættur hjá einum og hvørjum fakfelag. Um eitt felag, ikki hevur hendan møguleikan at fara í verkfall, er spurningurin, um tað yvirhøvur ber til at fáa rætta upp á eitt nú lønarskeivleikan hjá okkara limum. Tí, tað gevur ikki meining, at tit, bara tí tit arbeiða í einum umsorganarfaki, skulu fáa lægri løn enn í siðbundnum mannfólkayrkjum.

Seinasta verkfallið (í 2018, red.) og verkbannið tók ein part av hesum ójavnanum, tó tók tað tá 33 dagar við hørðum stríði at koma har til. Vit høvdu einki kunnað flutt, um vit ikki kundu seta stríðsstig í verk. Og vit høvdu einki kunnað flutt, um tit ikki øll vóru við okkum.

## Samanhald gevur styrkið

Hetta er heldur ikki bert ein tómur pástandur, tí veruleikin er, at vit sum felag í størri mun vera noydd at hugsa í uppaftur størri samstørvum, um vit framhaldandi skulu vænta at sleppa at ávirka heimin og samfelagið rundan um okkum. Tað hevur korona eisini lært okkum.

Flest øll fakfeløg hava havt lítla ávirkan á koronupolitikkin – sjálvt um roynt var at samskipa virksemið hjá fleiri feløgum í einum fakfelagsráðið. Hetta fer at vera ein táttur, sum vit í framtíðini í størri mun enn í dag mugu hava í huga.

Fakfelagssamtarvið, ið vit eru ein partur av, hevur eisini ávirkan, og er tað serliga ígjøgnum tað, at vit arbeiða við at stytta arbeiðvikuna og við at seta ljós á tað sálarliga arbeiðsumhvørvið.

## Taka í egnan barm

Men alt hevur ikki eydnast, og vit mugu onkuntíð taka í egnan barm Vandaviðbótin, ið vit settu á dagsskránna undir koronu, varð ikki væl móttikin, og var tað "timingin", ið serliga var skeiv. Eg fari at siga sum er, at ágangurin var mest frá okkara egnu limum. Limir, ið kundu havt nýtt høvið at sagt okkum frá uttan samstundis at fara í miðlarnar.

Hetta er átaluvert og eigur ikki at koma fyri. Tað er væl loyvt at vera ósamdur, men tá ein er partur av einum felagsskapið, hevur ein eisini nakrar skyldur mótvegis tí felagsskapinum. Rættast er tá at venda sær beinleiðis til tey, ein er ósamdur við. Arbeiðsgevarin fylgir eisini við og brúkar innanhýsis ósemjur ímóti okkum.

At vit seinni partvíst blivu stuðlað í okkara sjónarmiðum við leiðreglum, sum Etiska ráðið legði fram, er ein onnur søga. Eisini er vert at nevna, at í til dømis Norra var ein slík koronaviðbót longu avtalað ímillum partarnar í apríl 2020.

## Herðaklapp til limirnar

Sum limir hava tit skulað tolt nógv í hesum koronutíðum, og eg haldi, at tit eiga at fáa eitt stórt herðaklapp fyri tykkara stríð. Serliga tit, ið hava verði rakt av sóttarhaldi saman við búfólkum. Umframt at tit, ið skuldu mannað neyðansingina, tá alt var óvist, vóru serliga útsett.

Vónandi er alt hetta við at vera søga nú.

Í felagnum hyggja vit frameftir. Framtíðin snýr seg mest um at virka fyri, at tit fáa betri umstøður at virka í. At tit hava eitt sjónligt felag – eitt felag, sum tekur sær væl av sínum limum og virkar fyri at tryggja teimum góða løn og góðar setanartreytir.



# Eftirløn

Til eitt langt virkið lív, eftir at farið er av arbeiðsmarknaðinum, er gott við eini persónligari uppsparing.

**Lat okkum hjálpa tær at seta saman títt fíggjarliga trygdarnet.**

liv.fo